

# LIBERALISTISK SJÓNARMIÐ HÓTTA GAMLA FEUDALSKIPAN

**BÚSKAPARRÁÐIÐ** VIL TAKA RÆTTIN FRÁ **POLITIKARUNUM** AT ÁSETA **FISKIDAGAR** OG BÝTA ÚT **KVOTUR**, TÍ **VERANDI** SKIPAN ER **BÚSKAPARLIGA** OG LÍVFRØÐILIGA **ÓFORSVARLIG**. LANDSSTÝRISMAÐURIN VIÐ **FISKIVINNUMÁLUM** ER ÍMÓTI **UPPSKOTINUM**, KANSKA TÍ HANN **MISSIR** VALD OG **STUÐUL**, UM HANN **IKKI** SLEPPUR AT LATA **REIÐARUM MILLIÓNAVIRÐIR** Í HAVINUM. SOSTATT **BRÓTAST** NÚ GAMLA **FEUDALA** SIÐVENJAN, HAR **TRÚSKAPUR** MÓTVEGIS ÁVÍSUM **POLITIKARUM** KANN GEVA TILFEINGI **ÓKEYPIS**, OG EITT **LIBERALISTISKT** YNSKI UM AT SELJA **FÓLKSINS** OGN Í HAVINUM **FRÍTT**



**FISKIVINNA**

**Uni Arge**
ua@sosialurin.fo

Reiðararnir á havinum eru sum kongsbøndurnir á landi fyrr í tíðini, hava summi sagt. Teir berjast ímóti øllum broytingum í mátanum, sum tilfeingið verður umsitið, tí verandi skipan er nøktandi fyri teir. Teir kunnu hvørt ár trýsta tinglimir at áseta fiskidagarnar eftir egnum ynski heldur enn lívfrøðiligum og samfelagsbúskaparligum ynskjum, og tá kvotur verða býttar út, kunnu teir ganga á landsstýrismannin við fiskivinnumálum, sum einaráðandi situr í Fiskimálaráðnum og býtir út fisk fyri hundraðtals milliónir. Eru landsstýrismaðurin og teir, ið vilja hava milliónavirðir frá honum, samsintir, er trýst als ikki neyðugt. Í skipanini verður tá bara tigandi semja um, at hann býtir út fiskin, tá stundin er komin, og afturfyri fær hann so trúskap og tænastur frá teimum, ið fáa ágóðan av fiskinum, eitt nú tá løgtingsval eru. Báðir partar verja so eisini áhaldandi verandi skipan ímóti broytingum.

Í mangar mátar minnir hendan skipanin um feudalskipanina, sum var galdandi í nógvum evropeiskum londum í miðøldini. Límið í teirri skipanini var tvívegis trúskapur og skyldur millum ymisk løg í skipanini. Kongur var ovast og hevði tørv á, at ríkið hekk saman, og fyri at fáa tað at hanga saman, lænti hann stórmonnum brúksrættin til ein part av jørðini. Afturfyri svóru stórmenninir kongi trúskap og átóku sær at berjast fyri hann, tá tað var neyðugt. Stórmenninir læntu aftur góðseigarunum ein part av sínari jørð, sum so svóru stórmonnunum trúskap og átóku sær av verja teir. Næstniðastir í skipanini vóru altso góðseigararnir, sum so høvdu bøndur í arbeiði og kravdu avgjøld frá teimum. Afturfyri at bøndurnir sluppu at arbeiða hjá góðseigarunum, vardu góðseigararnir teir.

Niðast í feudalu skipanini var tó mangan ótespiligt at vera. Meira enn so kundi trýstið á bøndurnar gerast so stórt, at teir nærum gjørdust trælir hjá góðseigarunum. Tá hetta hendi, mistu teir allan hug til at skapa framtøk og menna landbrúkið. Teir høvdu hvørki stundir ella orku til tess. Góðseigararnir sjálvir høvdu ongan tørv á at nýmenna nakað, tí teir høvdu fyri onki fingið jørðina at umsita, og samstundis høvdu teir bíliga arbeiðsmegi, ið teir viðfóru, sum teir vildu. Hendan skipanin var bara møgulig orsakað av útlutaða tilfeinginum, jørðini, ið bant løgini í skipanini saman gjøgnum trúskap og sínámillum verju. Øll løgini vardu hvørt annað, so tey ikki mistu síni framíhjárættindi, men offrið var oftast niðasta lagið, bøndurnir, og nýskapan var altso ongin.

### Vald sum kongur

Landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum hevur á ein hátt vald á tilfeinginum sum kongur í feudalskipanini. Hann situr á skrivstovu síni í Fiskimálaráðnum við eini í grundini ótrúligari heimild. Hann kann býta út tilfeingi í havinum til vinir, kenningar og onnur fyri ovurstórar upphæddir hvørt ár. Búskaparráðið nevnir sum dømi í seinastu frágreiðing síni, at verður roknað við, at makrelkvotan í 2011 verður 100.000 tons, og 8 kr. fáast fyri hvørt kilo, er talan um eitt avreiðingarvirði upp á 800 milliónir krónur. Hesi virðir kann landsstýrismaðurin bara býta út, sum hann vil, og í fjør gjørdi hann tað so lættliga, at hann ikki so frægt sum gjørdi tað eftir kunngerð. Hetta var ólógligt, hevur landsstýrismannanevndin staðfest. Búskaparráðið nevnir, at um landið seldi hesi 100.000 tonsini fyri 2 kr. kilo í eini tilfeingisbúð, fingust 200 mió. kr. í tilfeingisgjaldi burtur úr søluni. Felagið Nótaskip hevur tó víst á, at makrelkvotan í fjør var 71.000 tons, og at avreiðingarvirðið fyri hvørt kilo var 4,30 kr. ella tilsamans 304 mió. kr.

Undir øllum umstøðum vil tann, sum er vanur við at fáa tílíkt tilfeingi fyri onki, treyðugt sleppa sínum framíhjárættindum, og hann, sum hevur roynt at selt rættindi til fisk víðari og fekk hundraðtals milliónir burtur úr tí, hevur als onga grund til at broyta skipanina, tí hann kendi í krónum og oyrum søta rákan av sínum framíhjárættindum. Tá var verri hjá teimum, sum keyptu rættindini í dýrum dómum. Har vaks skuldin upp um bæði oyru. Skalt tú tískil sleppa so bíliga sum gjørligt, er lættast at kenna fartelefonnummarið hjá landsstýrismanninum við fiskivinnumálum, sum Pól Huus Sólstein, stjóri, segði á Vinnudegnum 1. oktober í fjør. Við hesi útsøgn setti hann speiskliga orð á, hvussu tilfeingisumsitingin hongur saman. Stendur tú kongi nær og svør honum trúskapareið, er góður møguleiki fyri, at hann gevur tær nøkur framíhjárættindi til fiskin, sum løgtingið annars langt síðan hevur samtykt er fólksins og tískil landsins ogn.

Tá Búskaparráðið og fleiri politiskir flokkar, Fólkaflokkurin tó undantikin, stríðast fyri, at skipanin skal broytast, so landsstýrismaðurin ikki skal sleppa at vera kongur í fiskivinnumálum, og tinglimir ikki skulu sleppa at áseta fiskidagarnar, so elvir tað til samanbrestir millum sterk áhugamál. Fiskivinnan er so gomul vinna í Føroyum, at nógv siðvenja er knýtt at henni. Fleiri aktørar í vinnuni eru eisini sera sterkir, og teirra retorikkur um, at øll onnur skulu halda uppat at tosa um gjøgnumskygdar tilfeingisbúðir, tí fiskivinnan breyðføðir landið, er bæði áhaldandi og ofta speiskur. Fólk, sum ikki hava pissað í saltan sjógv, og sum kanska bara hava sitið á skúlabonki, eru øvundsjúk um tey, sum duga at tjena pengar, verður ofta sagt. Heldur skuldu tey takkað stórreiðarunum fyri teirra dirvi at gera íløgur í skip, sum kunnu fáa tilfeingið upp úr havinum.

Hesin retorikkur verður oftast førdur fram, tá fólkaflokksmenn tosa. Teir verja verandi skipan í fiskivinnuni við hond